# Ríkir av verkfallinum

VERKFALL
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Eins deyð, annans breyð. Meðan limirnir hjá Skipara og Navigatørfelagnum hava ligið í andvekri av ótryggu støðuni seinastu vikurnar, hava verkfallsbrótararnir, sum hava siglt við fólki og farmi um sund og fjarðir vunnið gylt av peningi.

Og hóast endin á verkfallinum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum kom sum ein lætti hjá flest føroyingum, so kemur endin á verkfallinum at merkjast í lummunum hjá teimum, sum hava tikið sær av siglingarleiðunum í landinum, meðan verkfallið hevur verið.

Smábátar um alt landið hava ført fólk og farm frá einum staði til eitt annað, og hetta hevur uttan iva givið teimum okkurt at liva av.



*Tilvildarlig mynd*

## 20.000 um dagin

Sosialurin hevur í samráð við góðar keldur gjørt leysligar útrokningar av hvussu gylt verkfallsbrótararnir hava vunnið um Leirvíksfjørð og úrslitið er helst tað sama um Vestmannasund.

Eini 4 bátar hava røkt leiðina um Leirvíksfjørðin, men afturat teimum hava onkrir smærri bátar eisini gjørt onkrar eykatúrar, tá nógv hevur verið at gjørt.

Eisini hava onkrir størri bátar ført farm um fjørðin, og hevur verkfallið uttan iva givið hesum bátum nakað meir av peningi, enn teir vildu fingið fyri at róð út sum vanligt.

Fasti prísurin fyri eitt fólk hevur verið 100 krónir hvønn vegin, og ein vanligan arbeiðsdag hava teir flutt yvir 200 fólk um fjørðin.

Hesi 300 fólkini skula jú eisini heimaftur, so tilsamans hava teir havt um 600 ferðafólk hvønn dag.

Tá hesi hava goldið 100 krónir hvønn vegin, gevur tað okkum eitt roknistykki, har úrslitið verður 60.000 krónir. Hvønn dag.

Hesir pengar skulu býtast millum bátarnar, og hava teir í miðal verið 6 hvønn dagin. Onkur hevur havt meir ferðafólk, og onkur minni. Men um vit aftur taka eitt miðaltal, so hava teir størru bátarnir fingið eini 25.000 av hesum hvør, meðan teir smærri so hava havt eina inntøku á 5.000 um dagin.

Ymiskt er, hvørjar útreiðslur hvør bátur hevur havt av flutninginum, men teir hava uttan iva havt meir enn helmingin eftir av inntøkuni.

Teir størru bátarnir hava møguliga havt eina fasta útreiðslu á 7.000 krónir, og so hava 18.000 krónir verið eftir.

# Nýtt pizzaria í Klaksvík

**Í dag letur einasta pizzaria í Klaksvík dyrnar upp. Her kunnu klaksvíkingar fyri fyrstu ferð njóta eina pizza bakaða av italienskum kokki á italienskum steinum**

*Ragnhild Ellingsgaard*




*Í dag klokkan 12.00 letur einasta pizzaria í Klaksvík fyri fyrstu ferð dyrnar upp*

**Klaksvík:** Tað er Njal Reinert Petersen, sum letur Pizzaria Napoli upp. Hetta er sami Njal, sum er kendur fyri at spæla til dans um alt landið saman við Mouritzi. Umframt at verða framúr dansitónleikari, so hevur Njal útbúgving sum Hotel og Restaurantiónskokkur, og var hann eisini í síni tíð við til at lata upp væl umtóktu matstovuna Hereford í Klaksvík. Pizzaria Napoli liggur eisini í kjallaranum hjá Hereford, og teir seinastu mánaðirnar hevur Njal, saman við kokkinum, arbeitt samdøgrið runt, soleiðis at Pizzaria Napoli kann lata dyrnar upp í dag.

## Pizzamentalitetur

Pizzain hevur rættiliga tikið seg fram sum eitt alternativ til tær føroysku frikadellurnar á døgurðaborðinum. Runt um allan heimin eta fólk pizza, og nú er túrurin so eisini komin til Klaksvíkina.

– Alla aðrastaðni í heiminum kann ein næstan tosa um ein beinleiðis pizzamentalitet, og við Pizzaria Napoli kemur hann eisini hendavegin, sigur Njal.

Hølið, har Pizzaria Napoli fer at halda til, er alt umvælt og gjørt av nýggjum. Hølini eru hugnalig, og avgjørt eina vitjan verd.

Inni í rúminum stendur ein stórur pizzaovnur, og í hesum ovni liggja steinar frá Italien. Við ovnin kemur ein italienskur pizzakokkur at standa, so fortreytirnar fyri at fáa eina góða og vælsmakkandi pizza skuldu avgjørt verið til staðar.

– Vit hava avgjørt at gera nógv burtur úr arbeiðsumhvørvinum, og hava vit gjørt nógvar umvælingar innan, sigur Njal.

Við hesum vónar hann, at bæði starvsfólkini og viðskiftafólkini koma at trívast inni á nýggja pizzarianum í Klaksvík.

## Blómar í Klaksvík

Ofta verður tikið til, at norðingar ikki tíma út at eta, og av tí sama er torført at fáa nakað at bera seg í Klaksvík. Men hóast Njal hevur hoyrt um hetta keðiliga fyribrigdi, so hevur hann góðar vónir.

– Í dag blomstrar alt lív í Klaksvík, og fólk hava tað gott. Tí meti eg eisini, at hetta skuldi gingið, sigur hann.

Á matarlepanum kann hann bjóða 42 rættir, og hesir verða so eisini útbygdir víðari eftir eina tíð.

Pizzaria Napoli letur dyrnar upp fyri fyrstu ferð í dag klokkan 12.00.

Vanligu upplatingartíðirnar verða frá klokkan 12.00 til 22.00 vanligar dagar (uttan mánadag), og frá klokkan 12.00 til 23.00 í vikuskiftinum.



*Reinert Petersen vónar, at klaksvíkingar eisini fara at taka nýggja pizzamentalitetin til sín*

# Rætting

Í Sosialinum týsdagin tann 7. mei stóð at lesa um eina uttandura mótaframsýning, sum varð hildin í Klaksvík fríggjakvøldið tann 3. mei.

Í greinini stóð, at Klaksvíkar Handilsfelag hevði skipað fyri mótasýningini, men hetta var ikki rætt.

Handlarnir høvdu sjálvir tikið stig til mótasýningina, og hevði Handilsfelagið einki við hana at gera.

Vónandi heldur lesarin okkum til góðar.

**-re**



# Skiparin á Smyrli hampiliga væl nøgdur

**– Nú er lønin hjá okkum farin at líkjast nøkrum, men tað var upp á tíðina, tí hon hevur verið alt ov lág, sigur skiparin á Smyrli**

LØNARHÆKKINGAR
*Áki Bertholdsen*



*– Eg havi ikki ringa samvitsku fyri tað um vit hava fingið eina trivaliga lønarhækking, sigur Hanus Lassen, skipari á Smyrli*

– Eg eri hampiliga væl nøgdur.

Hanus Lassen, skipari á Smyrli, sigur, at hann tekur fult undir við at Skipara- og Navigatørfelagið setti lønarkrøv, sum kanska kundi tykjast eitt sindur stór.

– Lønin hjá okkum er afturútsigld í so stóran mun, at nú mátti okkurt henda, sigur Hanus Lassen. Og hann leggur afturat, at hóast lønarhækkingin kanska kann tykjast eitt sindur ógvuslig, hevur hann avgjørt ikki ringa samvitsku.

– Eg haldi ikki, at vit skulu hava ringa samvitsku av at hava fingið eina trivaliga lønarhækking, tí tað var fyri neyðini, at lønin hækkaði. Og skuldi tað líkjast nøkrum, kundi hækkingin ikki verið minni.

Eftir semjuni ímillum Skipara- og Navigatørfelagið, er tað skiparin á Smyrli, sum fekk eina tað størstu lønarhækkingina.

Umframt vanligu lønarhækkingina uppá góð 9%, er viðbótin hjá skiparanum á Smyrli hækkað úr 2.000 krónum um mánaðin, upp í 7.500 krónur.

Sostatt hækkar lønin hjá skiparanum á Smyrli úr góðum 25.500 krónum um mánaðin, upp í góðar 35.000 krónur, tá allar lønarhækkingarnar í sáttmálanum eru settar í verk.

## Skiparin ikki hægstløntur

– Hetta kann tykjast nógv, men veruleikin er, at summir av yvirmonnunum á Smyrli hava verið í eini serstøðu hjá Strandferðsluni, sigur Hanus Lassen

– Skiparin og maskinmeistarin á Smyrli eru teir einastu av øllum manningunum hjá Strandferðsluni, sum ikki fáa yvirtíð.

– Tað merkir, at sama, hvussu nógv vit hava siglt, hava vit báðir ikki fingið yvirtíð, samstundis sum øll hini umborð á Smyrli og á øllum hinum strandfaraskipunum, hava fingið yvirtíð.

Hann sigur, at hetta hevur skapt ein ójavna í lønarviðurskiftunum, sum hevur verið ringur at góðtikið, tí sama, hvat er komið afturat av eykaarbeiði, hevur skiparin og maskinmeistarin á Smyrli ikki fingið eitt oyra fyri tað, samstundis sum øll hini hava fingið yvirtíð.

– Hetta hevur ført tað við sær, at tað eru fleiri av manningini á Smyrli, sum fáa nógv hægri løn enn skiparin.

Og tað man stríða ímóti vanligari hugsan, tí hjá teimum flestu er ongin ivi um, at umborð á skipi eigur skiparin at vera best løntur.

– Tað er hann eisini umborð á øllum skipum – uttan umborð á Smyrli.

– Tað er hetta, sum Skipara- og Navigatørfelagið hevur roynt at rætta hesuferð. Men hesi seinastu árini er gloppið blivið so stórt, at lønarhækkingin tykist nakað ógvuslig, men tað kundi ikki vera øðrvísi, sigur Hanus Lassen.

– Men hóast vit hava fingið eina góða lønarhækking hesuferð, er skiparin á Smyrli, framvegis ikki hægst løntur umborð, sigur hann.

– Eftir lønarhækkingini hesuferð, eri eg ikki meiri enn akkurát farin upp um lønina hjá Skiparanum á Teistanum, hóast hann er nógv minni skip enn Smyril er.

## Ov lítil samhugi

Annars heldur Hanus Lassen, at verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum, hevur ikki havt stóran samhuga ímillum manna.

– Tað er harmiligt at síggja, at nógvir av okkara egnu starvsfeløgum hava verið við til at máa støðið undan verkfallinum við at sigla við ferðafólki og farmi ímeðan verkfallið hevur verið.

– Og tíverri vísir tað seg, at verkfallið rakar so ójavnt, so tað er spell, at tað skal hava vart so leingi.

– Okkara starvsfelagir við skipum, har teir hava fleiri ferðir so høga inntøku, sum vit, hava ikki víst serliga samhuga við okkum, og tað er spell, men soleiðis er tað. Tað eru okkara egnu starvsfelagir, sum ganga á odda at bróta okkara egna verkfall, staðfestir Hanus Lassen.

# Vilja hava sigling í trygga legu

**Skipara og Navigatørfelagið fer nú at bjóða fíggjarmálastýrinum til samráðingar um at gera yvirmenninar hjá Strandferðsluni til yvirmenn**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Ellintur Abrahamsen*

Hóast Skipara- og Navigatørfelagið akkurát hava gjørt nýggjan sáttmála fyri yvirmenninar við almennum skipum, er tað ikki vist, at samráðingarnar ímillum partarnar eru lidnar fyri tað.

Eftir sáttmálunum, sum vórðu gjørdir seinastu nátt, verða skipararnir og stýrimenninir á skipunum hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, nú tænastumenn.

Hetta hevur ávísar fyrimunir við sær fyri menninar, men tað ber eisini í sær, at nú kunnu teir ikki longur fara í verkfall.

Men Skipara- og navigatørfelagið heldur eisini, at yvirmenninir við skipunum hjá Strandferðsluni somuleiðis eiga at gerast tænastumenn.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, sigur, at so skjótt sum greiða er fingin á politisku støðuni, fer felagið at venda sær til Fíggjarmálaráðið at bjóða teimum samráðingar um at gera yvirmenninar hjá Strandferðsluni til tænastumenn.

Hann vónar so, at samráðingar kunnu byrja beint eftir summarfríðina.

Hann heldur, at tað hevur týdning at fáa hesi viðurskifti avgreitt ímeðan friður er á arbeiðsmarknaðinum, so at samráðast kann i friði og náðum.

– Vit halda at verkføll, sum hetta, ið júst hevur verið, eru fullkomiliga meiningsleys og vit ætla at gera tað, vit kunnu, fyri at sleppa undan at støður, sum hesar, taka seg upp aftur.

Hann sigur tað skal ikki standa á Skipara- og Navigatørfelagnum, at fáa yvirmenninar á Strandferðsluni til tænastumenn.

– Men sjálvsagt verður tað ikki ókeypis, so tað skulu samráðingar til um nøkur viðurskifti, sigur hann.

Skiparin á Smyrli, Hanus Lassen, er ivingarsamur við ætlanini at gera teir til tænastumenn.

– Tað veldst um, hvat liggur í tí. Men fáa vit hampiligar treytir, vænti eg ikki, at vit fara at seta okkum ímóti tí, sigur hann

– Ongin er fegin um at leggja alt lamið, so finna vit eina skipan, sum kann forða fyri tí, eiga vit ikki at vísa tí aftur, men tað veldst um treytirnar, sigur Hanus Lassen.

## Má ikki henda aftur

Hetta er ein tanki, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum tekur undir við.

– Eg havi sjálvur borið tað upp á mál, at viðvíkjandi Suðuroynni og kanska Sandoynni við, eiga vit at finna eina skipan, sum tryggjar at slíkt ikki hendur aftur.

Tí er tað ein tanki atgera teir til tænastumenn, ella at geva teimum eina tænastumannalíknandi skipan, sum gevur fólkunum nøkur rættindini afturfyri ikki at fara í verkfall.

Hinvegin verður siglingin um Vestmannasund og um Leirvíksfjørð niðurløgd tey næstu árini, tí undirsjóvartunlar skulu gerast.

Ellintur Abrahamsen heldur at spurningurin um tænastumenn og spurningurin um leiðir, sum verða niðurlagdar, eru tvey ymisk mál, sum ikki skulu blandast saman.